# PISA-úrslitið sæst ikki aftur

**Tað kann væl vera, at yvirskot er á fíggjarlógaruppskotinum, men í fólkaskúlanum er undirskot, sigur Magnus Tausen, formaður Føroya Lærarafelags, sum vónar landsstýrið ger av at hækka játtanina í fíggjarlógaruppskotinum**

FÍGGJARLÓGIN

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Ein bólkur, ið helst er vónbrotin av fíggjarlógaruppskotinum, eru øll tey, sum fingu ein skelk í heyst, tá úrslitið av Pisa-kanningunum varð avdúkað. Sambært kjakinum, sum var í kjalarvørrinum av Pisa-kanningini, var eingin ivi um, at fólkaskúlin trongir til eina veldiga andlitsupplyfting. Landsstýrið hevur gjørt av at hækka játtanina til fólkaskúlan við 8,1 milliónum krónum, sum í stóran mun fara til lønarhækkingar, at styrkja leiðslurnar og til byrja frálæruna í enskum fyrr. Harumframt verða 3,6 krónur játtaðar til stuðlar í fólkaskúlanum.

### Ikki bara ringt

Magnus Tausen, formaður Føroya Lærarafelags leggur fyri við at frøast um, at játtanin til stuðlar til næmingar við serligum tørvi hækkar, og hann metir hetta vera eitt stórt framstig fyri hesar næmingar, sum hava ilt við at fóta sær einsamallar í einum vanligum skúlaflokki.

### Álit handað í vikuni

Seinastu mánaðirnar hevur ein arbeiðsbólkur eftirmett og viðgjørt úrslitið av Pisa-kanningini, og niðurstøðurnar hjá arbeiðsbólkinum áttu av røttum at verið lætnar landsstýrismanninum í dag. Men av ymsum orsøkum er handanin av álitinum útsett til seinni í vikuni. Magnus Tausen sigur, at tey í arbeiðsbólkinum eru komin fram til, at nøkur øki eru, sum heilt givið eiga at verða tikin við í fíggjarlógaruppskotinum í ár.



*Magnus Tausen heitir á landsst‡rismannin í skúlamálum um at gera broytingar í fíggjarlógaruppskotinum, áðrenn viðgerðin er liðug.*

- Tað eru trý øki, sum vit áttu at fingið við beinanvegin. Eitt nú hava næmingar í 1. flokki í Danmark millum 25 og 29 tímar um vikuna, meðan okkara hava einans 18 tímar. Harumframt hevur móðurmálið munandi verri umstøður her hjá okkum, har ein dani í 1. flokki hevur 12 tímar í donskum og ein føroyskur næmingur hevur bert 7 tímar í føroyskum. Harumframt kunnu vit nevna náttúruvísindaligar lærugreinirnar, har føroyski fólkaskúlin eisini er eftirbátur, sigur Magnus Tausen, sum vónar, at føroyskir politikarar fara at reagera líka skjótt, sum teir donsku gjørdu, tá niðurstøðurnar av álitinum verða handaðar fyrsta dagin.

### Tað er ikki ov seint

- Eg ynski inniliga, at vit teir gera av at flyta eina hampiliga upphædd av yvirskotinum yvir á fólkaskúlan longu í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2007, soleiðis at vit kunnu fara beint undir at betra um dygdina á skúlaøkinum skjótast, sigur Magnus Tausen, sum eisini vil vera við, at politikararnir mugu fáa álitið í hesi vikuni, tí í næstu viku er heystfrítíð og tá er ov seint.

- Tað kann væl vera, at vit hava yvirskot á fíggjarlógaruppskotinum, men í fólkaskúlanum er undirskot, sigur Magnus Tausen.

### Ikki fleiri bøkur

Annað, sum undrar Magnus Tausen er, at játtanin til bókaútgávur er óbroytt.

- Játtanin til Bókadeildina hevur verið óbroytt í mong mong ár, og er tað í veruleikanum ein lækking, tá játtanin ikki verður regulerað. Harumframt undrar tað meg stórliga, at játtanin til Skúlabókagrunnin ikki er hækkað, tí tað er eitt øki, har vit eru í undirskoti. Um vit veruliga ynskja at hava heimsins besta skúla, so mugu játtanirnar eisini fylgja við, sigur Magnus Tausen. Og hann endar við, at heita á landsstýrismannin um at gera neyðugu broytingarnar í fíggjarlógaruppskotinum, áðrenn viðgerðin er liðug.

Tað bar ikki til at fáa eina viðmerking frá Jógvan á Lakjuni, landsstýrismanni í undirvísingar og mentamálum, tí hann er í Rom. Heldur ikki var nakar annar tøkur á fólkaskúladeildini, tí tey vóru á fundi.

# Ein fær og annar missir

**Sum altíð, tá fíggjarætlan verður løgd, er onkur, sum fær, meðan onnur mugu bíða ella lúta. Vit hava hugt nøkrum kontum, har munur er á, í mun til 2006.**

FÍGGJARMÁL

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Sambært fíggjarlógaruppskotinum 2007 økjast rakstrarútreiðslurnar 102,7 mió. kr.. Herav eru sáttmálalønarhækkingar upp á góðar 30 mió. kr. Lógarbundnu útreiðslurnar vaksa 39,9 mió. kr. Løguútreiðslurnar vaksa 3,2 mió. kr. Játtanin til landsfyritøkur veksur 34,6 mió. kr. og onnur játtan minkar 467,2 mió. kr., harav vaksa útreiðslurnar 29,5 mió. kr. og inntøkurnar vaksa 496,7 mió. kr.

Farið verður tí frá einum hallið á 212,5 mió. kr. á fíggjarlógini 2006 til eitt avlop á 74,5 mió. kr. á fíggjarlógaruppskotinum 2007.

### Raðfestingar hjá einstøku landsstýrismonnunum

Vit fara at hyggja nærri at, hvørji øki fáa hægri játtan og hvørji fáa lægri í fíggjarlógaruppskotinum 2007, og hvussu broytingarnar eru býttar millum ymsu greinirnar.

Niðanfyri eru vístar nakrar broytingar frá fíggjarlógini 2006 til fíggjarlógaruppskotið 2007, sum eru størri enn 1 mió. kr.

**Løgtingið:** Í fíggjarlógaruppskotinum verða rakstrarútreiðslurnar øktar við 1,9 mió. kr. Hetta er til KT og nýtt innbúgv til nýggja løgtingshúsið. Íløgujáttanin til løgtingshúsið lækkar 18 mió. kr.

**Løgmansfyrisitingin:** Í fíggjarlógaruppskotinum 2007 verða rakstrarútreiðslurnar hjá løgmansfyrisitingina og sendistovum øktar 760 tús. kr. Íløgujáttanin til umbygging í Tinganesi minkar við 1,0 mió. kr.

**Fíggjarmál:** Karmurin hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum verður øktur 30,3 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2007 samanborið við fíggjarlógina 2006. Her kann eitt nú verða nevnt, at Hagstova Føroya fær eina eyka játtan áljóðandi 1,6 mió. kr. Toll- og skattstova Føroya fær 1,5 mió meira enn í 2006.

**Fiskivinna:** Karmurin hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum verður øktur 2,4 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2007 samanborið við fíggjarlógina 2006. Her er vert at nevna at játtanin til útgerð til Magnus Heinason er hækkað við 3,0 mió. kr. og kemst hetta av, at skipið skal undir nýggja granskingaverkætlan. Játtanin til telefonstuðul til fiskimenn á 2 mió. kr. dettur burtur, hvalagransking og hvalateljing fær 1,6 mió. eyka.

**Vinnumál:** Karmurin hjá landsstýrismanninum í vinnumálum verður øktur 12,6 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2007 samanborið við fíggjarlógina 2006. Her kann vera nevnt, at Endurgjald til skipasmíð hækkar við 5,0 mió. kr, og at settar eru 1 mió. kr. eyka til eina granskingarlund. Játtanin til nýggjar landsvegir lækkar við 5,5 mió. kr.

**Útbúgving og gransking:** Karmurin hjá landsstýrismanninum í útbúgvingar- og granskingarmálum verður øktur 40,9 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2007 samanborið við fíggjarlógina 2006.

Sí talvu 1

**Almanna-og heilsumál:** Karmurin hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum verður øktur 67,2 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2007 samanborið við fíggjarlógina 2006.

Sí talvu 2

**Innlendismál:** Karmurin hjá landsstýrismanninum í innlendismálum verður øktur 40,2 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2007 samanborið við fíggjarlógina 2006. Her kann vera nevnt, at játtanin til Strandfaraskip Landsins er økt við 35,1 mió. kr., sum í stóran mun fer til nýggja Smyril, sum hevur víst seg at vera nakað væl dýrari í drift enn roknað var við upprunaliga.

**Inntøkur:** Í fíggjarlógaruppskotinum 2007 vaksa inntøkur landskassans 450,3 mió. kr. samanbornar við fíggjarlógina 2006.

*GG.Har, sum minus stendur framman fyri, er talan um eina hækking, meðan har sum + stendur framman, er talan um eina lækking.*

**Talva 1**

| | | |
|---|---|---|
| -Yvirtøka av prestagørðum | - | 17,6 mió. kr. |
| -Skúladepil í Suðuroy | - | 17,0 mió. kr. |
| -Miðnámsútbúgvingar | - | 8,9 mió. kr. |
| -Fólkaskúlin | - | 8,1 mió. kr. |
| -Sernámsdepilin | - | 3,6 mió. kr. |
| -Ymsar felagsútreiðslur | - | 2,8 mió. kr. |
| -Musikkskúlar | - | 2,6 mió. kr. |
| -Lestrarstudningur | - | 2,0 mió. kr. |
| -Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð | - | 1,9 mió. kr. |
| -Fiskivinnuskúlin | - | 1,8 mió. kr. |
| -Læraraskúlin | - | 1,8 mió. kr. |
| -Læraraeftirlønir | - | 1,5 mió. kr. |
| -Føroya Læraraskúli | + | 1,0 mió. kr. |
| -Klaksvíkar Sjómansskúli | + | 1,2 mió. kr. |
| -Almanna- og heilsuskúli Føroya | + | 1,5 mió. kr. |
| -Nýggj tøkni, SVF og ÚF | + | 2,0 mió. kr. |
| -Skúladepilin við Marknagilsvegin | + | 3,0 mió. kr. |

**Talva 2**

| | | |
|---|---|---|
| -Eldrarøkt | - | 15,2 mió. kr. |
| -Landssjúkrahúsið | - | 12,5 mió. kr. |
| -Fyritíðarpensjón | - | 10,7 mió. kr. |
| -Fólkapensjón | - | 10,1 mió. kr. |
| -Viðbót til ávísar pensjónistar | - | 5,4 mió. kr. |
| -Serforsorg | - | 4,9 mió. kr. |
| -Børn og ung | - | 4,4 mió. kr. |
| -Barnaískoyti | - | 3,8 mió. kr. |
| | | |
| -Serviðgerð uttanlands | - | 4,3 mió. kr. |
| -Eldrasambýli | - | 3,0 mió. kr. |
| -Vanlig forsorg | - | 2,6 mió. kr. |
| -Klaksvíkar Sjúkrahús | - | 2,5 mió. kr. |
| -Stuðul til fyriskipan fyri heimleys | - | 2,4 mió. kr. |
| -Almanna- og heilsumálaráðið | - | 2,1 mió. kr. |
| -Ílegusavnið | - | 2,1 mió. kr. |
| -Viðlíkahald | + | 2,2 mió. kr. |
| -Medicoteknisk tól | + | 2,0 mió. kr. |
| -Heilsuátøk | + | 2,5 mió. kr. |
| -Talgild heilsuskipan | + | 5,0 mió. kr. |
| -Søla av íbúðarbygningum | + | 5,0 mió. kr. |
| -Apoteksverkið | + | 10,0 mió. kr. |